# KI HVAT





*Líkt er ikki til, at høgra hond veit, hvat vinstra hond ger. Jacob Vestergaard sigur, at Fiskimálaráðið krevur umskiping í føroyskari havn – og Annika Olsen væntaði slett ikki, at Thor-skipini fóru at umskipa við bryggju*



fyri skip, sum sigla undir føroyskum flaggi og sum í hesum førinum eitt skifti eru virkin í okkara sjógvi. Hetta vóru treytir, sum vóru galdandi, áðrenn Athena og Poseidon fingu loyvi at veiða og virka í føroyskum sjógvi, og tá hesi skip nú eru her eitt skifti, kundi landsstýrið ikki seta hesum skipum øðvísi treytir enn øðrum skipum.

– Vit hava soleiðis kravt, at Athena og Poseidon umskipa veiðina í havn – og ikki á opnum havi.

Landsstýrismaðurin vísir á, at kravið hjá Fiskimálaráðnum um umskiping í havn hevur eisini nakað við eftirlit við veiði og umhvørvi at gera. Haraftrat merkir eitt slíkt krav, at nakrar inntøkur verða skaptar við eitt nú havnargjaldi og møguligum veitingum annars.

– Er tað soleiðis, at nýggjar og skerpaðar kunngerðir, sum hava tilknýti til útlendingalógina, eru lýstar í summar, sum vit ikki kenna – ella ikki kenna nóg væl – mugu vit taka krøvini um føroyska havn upp til eftirmetingar. Hinvegin síggi eg fyri mær, at tað verður ógvuliga trupult at fáa arbeiðsloyvi til øll tey, sum sigla við útlendskum og føroyskum skipum og sum bara av og á koma til bryggju í Føroyum.

Landsstýrismaðurin sigur seg einki vita um, at føroyskir myndugleikar eru kunnaðir um nýggju kunngerðirnar, og tískil er heldur ikki greitt, hvussu hesar skulu tulkast.

– Men hetta er ikki eitt mál, sum eg umsiti í landsstýrinum, leggur hann aftrat.

**» ... vit hava kravt, at Athena og Poseidon umskipa veiðina í havn – og ikki á opnum havi...**
JACOB VESTERGAARD

### Ikki somu treytir

Jacob Vestergaard sigur, at í skipsfarti hava sum heild ikki somu atlit verið tikin til arbeiðsloyvi, sum til fólk, ið koma higar at arbeiða og búgva. Soleiðis hava russisk skip og onnur skip eisini ligið við føroyskan bryggjukant og hava tikið ímóti fiski, sum er frystur ella virkaður umborð. Hetta hevur verið gjørt við bæði gulllaksi og upsa, tá trupult hevur verið at funnið aðrar loysnir.

Landsstýrismaðurin vísir á, at útlendingalógin í praksis vanliga plagar at regulera viðurskiftini inni í landinum, men tá útlendskir fiskimenn arbeiða umborð, er hetta eftir hansara tykki ein avgerandi munur.

– Sum útlendskur fiskimaður umborð á útlendskum ella føroyskum skipi er ikki neyðugt at tjena eina ávísa upphædd til lívsins uppihald á landi, tí fiskimaðurin verður fyrsyrgdur umborð á skipinum.

Men er tað soleiðis, leggur Jacob Vestergaard dent á, at kravið hjá Fiskimálaráðnum um at umskipa veiði í føroyskari havn stríðir ímóti nýggju kunngerðunum, sum eru tengdar at útlendingalógini, verður neyðugt at taka hetta mál upp.

– Eg síggi tó fyri mær, at hetta kann gerast ógvuliga trupult og rættiliga umsitingarligt, um eitt nú russiskir fiskimenn, sum eitt skifti virka í okkara havøki, skulu noyðast at hava arbeiðsloyvi í Føroyum. Hetta kann í síðsta enda koma at ganga útyvir tað annars góða og gevandi samstarv, vit í nógv ár hava havt við eitt nú russar á fiskivinnuøkinum, sigur hann.

### Yvirtøka av málsøki

Landsstýrið arbeiðir við at yvirtaka útlendingaøkið, og Jacob Vestergaard sigur, at tað, sum nú sær út til at vera hent, sigur honum, at hetta eigur at gerast so skjótt, tað letur seg gera.

– Føroyar hava síni áhugamál í fiskivinnusamstarvi við aðrar tjóðir, og sum eg segði, kunnu umstøðurnar gerast rættiliga truplar, um vit nú ikki longur kunnu krevja, at umskiping skal fara fram í føroyskari havn, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

*vilmund@sosialurin.fo*

**» ... nú er hetta eitt mál, sum ikki liggur í okkara hondum, men eitt løgreglumál...**
ANNIKA OLSEN

# Undarligt mál um fiskiveiði

**Vilmund Jacobsen**

Sum journalistur fært tú nógvar ymiskar uppgávur. Nógvar eru lættar og stuttligar at handfara, meðan aðrar, sum eisini skulu gerast, eru minni stuttligar. Tó at tú ikki vilt nøkrum ilt, sum ikki hevur fortjent tað, kunnu summi viðurskifti, tú noyðist at taka upp, tykjast so. Viðhvørt kunnu greinar og skriving um ávís mál næstan kennast sum forfylging, tó at tað heldur ikki var ætlanin.

Nú stóru skipini hjá reiðaríinum Thor í Hósvík virka í føroyskum sjógvi fyri eina tíð, er ikki sørt, at hesi eru komin í andglettin.

Skipini hava fingið loyvi at fiska eina ávísa nøgd av makreli í føroyskum sjógvi, nú heildarkvotan av makreli, sum lansstýrismaðurin hevur ásett fyri 2010, er nógv størri enn onnur ár.

Aftrat egnum fiskirættindum eftir makreli í føroyskum sjógvi, er felagið, sum eigur hesi stóru verksmiðjuskipini, eisini farið í samstarv við føroysk reiðarí, sum eiga ísfiskaskip.

Spurningurin er, um føroysk ísfiskaskip, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eisini hevur tillutað ávísa makrelkvotu, høvdu fingið nakað burtur úr hesum rættindum, um skipini ikki vóru í einum ávísum samstarvi.

Skal makrelur landast til matna, sum aðalmálið sjálvandi er, er neyðugt, fiskurin kemur umborð á skip, sum eru egnað til at taka ímóti.

Ísfiskaskipini eru ikki útgjørd til at veiða makrel og fáa fiskin til lands sum mannaføði.

Hinvegin kunnu skipini veiða fiskin, men neyðugt er, at onnur og egnaði skip taka fiskin umborð, frysta hann og føra hann til lands.

### Løgreglumál

Síðan stóru skipini hjá Thor, Athena og Poseidon, komu í føroyskan sjógv, er eisini løgreglan komin upp í. Tað er nevniliga løgreglan, sum hevur eftirlitsmyndugleikan á útlendingaøkinum í Føroyum, og umborð á hesum báðum skipum er nógvir útlendingar.

Manningarnar telja einar 200 mans tilsamans, harav yvirmenninir eru føroyingar.

Í síðstu viku segði Bergleif Brimvík, politikommiserur, at løgreglan soleiðis hevur verið umborð á Athenu, meðan skipið umskipaði veiðina umborð á frystifarmaskip.

Manningin umborð tók sær av hesum, og nú situr løgreglan við málinum, hvørt ákæra skal reisast móti skipi ella reiðarí fyri brot á útlendingalógina.

Meiri er at lesa um hetta mál og viðurskiftini rundan henda spurning í hinari greinini á hesi opnu.

Sosialurin hevur í morgun roynt at fingið fatur í Bergleifi Brimvík fyri at vita, um løgreglan er komin til nakra niðurstøðu í málinum, men hann var ikki at hitta.

Vit fara tó at fylgja málinum upp, sum dagarnir ganga.

Málið tykist tó nokso undarligt, tí tað sambært Jacobi Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, er Fiskimálaráðið, sum hevur kravt, at veiðan verður umskipað í havn – og ikki á opnum havi.

Nú er so líkt til, at júst hetta krav kann føra til, at reiðaríið, sum eigur Athenu og Poseidon, verður ákært fyri brot á nýggjar kunngerðir í útlendingalógini.

### Heldur heilsa...

Sum journalistur, ið skrivar um fiskivinnu, hevði tað verið hugaligari at heilsa hesum báðum skipum vælkomnum í føroyskan sjógv til øktar veiðimøguleikar, heldur enn at gjørt so nógv burtur úr, um ákæra verður reist ella ei.

Men hetta eru nú einaferð kostirnir, tá mál skulu lýsast.

Áhugavert verður at fylgja gongdini og síggja, hvat útfallið verður av hesum máli, sum nú er endað sum eitt løgreglumál.

*vilmund@sosialurin.fo*